Nr. 5 | 1. aug 2008 | 61. árið

# Kirkjuligt Missiónsblað

## Hvør tann, ið tí vil kennast við meg

Hvør tann, ið tí vil kennast við meg fyri monnum, hann vil eisini eg kennast við fyri faðir mínum, sum er í himlunum. Men hvør tann, ið avnoktar meg fyri monnum, hann vil eisini eg avnokta fyri faðir mínum, sum er í hímlunum.

Matt. 10,32—33.

HESI orðini segði Jesus við lærusveinarnar, tá ið hann sendi teir út. Var tað neyðugt hjá Jesusi at siga hesi orðini við lærusveinarnar, teir sum høvdu fylgst við honum? Ja, tað var neyðugt hjá Jesusi at gera teimum greitt, at teir fóru at møta nógvari mótstøðu.

Ímillum hesar, sum Jesus sendi út, var Judas Iskarjot, sum ein dag sveik sín Harra og meistara fyri tríati silvurdálar. Og Pætur, sum avnoktaði Jesus, var eisini ímillum hesar, sum Jesus sendi út.

Á sama hátt sum Jesus sendi lærusveinarnar út tann dagin, soleiðis sendir hann okkum menniskju út í dag at boða evangeliið um hann.

Tað sama, sum Jesus segði við lærusveinarnar, sigur hann við okkum: »Hvør tann, ið tí vil kennast við meg fyri monnum, hann vil eisini eg kennast við fyri faðir mínum.«

Men okkara menniskjaliga náttúra, hon stríðir ímóti Gudi. Kjøt og blóð tað krympar seg við at viðkennast Jesus. Tí var tað eisini neyðugt hjá Jesusi at siga hesi orðini: »Men hvør tann, ið avnoktar meg fyri monnum, hann vil eisini eg avnokta fyri faðir mínum, sum er í himlunum.«

Tað er altíð lættari at ganga undanbrekku enn at ganga mótbrekku, men lívið hjá einum kristnum er altíð ein mótbrekka, tá ið lívið hjá einum kristnum er blivið ein undanbrekka, tá er vandi á ferð, tí at breiður er vegurin, ið førir til undirgangs.

Lærusveinarnir teir gingu mótbrekku við Jesusi, men tá ið Jesus bleiv tikin frá teimum og skuldi krossfestast, tá vísti tað seg, at teir høvdu allir lyndi til at ganga undanbrekku.

Pætur segði einaferð við Jesus: »Um eg so skal doyggja við tær, skal eg ikki avnokta teg.« Hann var helst eisini tann óræddasti av lærusveinunum, tað var hann, sum fylgdi Jesusi longst, ja, heilt inn í borgargarðin. Tað vísir seg, at aftaná at hinir lærusveinarnir eru farnir at ganga undanbrekku, vil Pætur halda fram við at ganga mótbrekku, men mótbrekkan verður ov tung at ganga, tá ið arbeiðsgentan segði við hann: »Tú ert ein av teimum,« tá bleiv hann bangin fyri lívi sínum, tá tordi hann ikki at líta á orðini hjá Jesusi: »Tann, ið missir lív sítt fyri mínar sakir, skal bjarga tí.«

Men í dag er tað ikki Pætur og Judas tað snýr seg um, í dag er tað eg og tú.

Tað varð sagt við Jóhannes doyparan: »Ert tú Kristus?« Jóhannes kundi verið freistaður til at sagt ja, men hann segði nei, hann vildi ikki gera seg størri enn hann var. Hann segði: »Eg eri rødd á einum, sum rópar í oyðimørkini.« Jóhannes segði sannleikan. Men tá ið tað bleiv sagt við Pætur, tú ert ein av teimum, tá segði hann nei, hann leyg.

Vit liva í heimsins oyðimørk, og vit eru eisini rødd á einum sum rópar í oyðimørkini.

Tá ið Jóhannes var tikin av døgum, tá fekk hann tann vitnisburð av menniskjum, at alt tað, sum hann hevði sagt um Jesus var satt.

Máttu vit eisini kunnað fingið tann vitnisburð, sjálvt um tað tykist, at vit standa í einari oyðimørk og rópa, at tað, sum vit siga um Jesus er satt.

Jóhannes doyparin segði, at hann var ikki Kristus. Men tað skulu nógvir koma fram og geva seg út fyri at vera Kristus, men tað eiga vit ikki at lurta eftir.

Pætur avnoktaði Jesus tí at hann bleiv bangin. Vit kunnu eisini koma at avnokta Jesus tí at vit eru bangin, men so mugu vit minnast til orðini hjá Jesusi, at um vit avnokta hann fyri monnum, so vil hann eisini avnokta okkum fyri faðir sínum. Vit kunnu avnokta Jesus á ymiskan hátt, um okkara lív ikki samsvarar við tað, sum vit prædika, koma vit at avnokta Jesus. Tað er ikki soleiðis at fata, at vit nakrantíð sleppa av við syndina soleingi vit liva her á jørðini. Men vit eiga at hava greiðar linjur, vit eiga at gera upp við menniskju, vit eiga ikki at hava nakað útistandandi við menniskju.

ANDAKT

## Andakt

Hoyr tað sigur: "Rópa!" Og eg svari: "Hvat skal eg rópa?" "Alt hold er gras, og allur yndisleikur tess sum blóma á markini. Grasið visnar, blóman følnar, tá ið andi Harrans blæsur á tey. Sanniliga, menniskjan er gras. Grasið visnar, blóman følnar, men orð Guðs várs stendur allar ævir." **Jes. 40, 6-8.**

Tíðin er eitt løgið fyribrigdi. Neyvan man nakað annað orð vera so ofta á mannatungu: Hvat er klokkan nú, nú fer at vára aftur, eg havi ikki tíð, tíð hava vit nóg mikið av o.s.fr. Ein setningur fyri og annar eftir, sum umrøða tíðina.

Men hóast hetta orð "tíðin" verður kasta út um varrar okkara, er tað neyvan nakað annað fyribrigdi sum hetta, ið heilt kann taka okkum av bóli og ørkymla okkum. "Á, sum tíðin flýgur avstað!" Ert tú vorðin so stórur longu? Hvar varð tíðin av?

Í brævi sínum skrivar Jákup so ramliga um hetta: " Tí at hvørjum er lív tykkara líkt? Tí at tit eru ein roykur, sum eina stutta stund er sjónligur og so hvørvur burtur."

Hetta sigur ikki, at lívið ikki kann vera ríkt, men foldarlívið fær ein enda, og hesum skulu vit geva gætur – orð Guðs stendur í allar ævir.

Sjálvt storkurin uppi í loftinum veit sína ásettu tíð; og turtildúgvan, svalan og tranin halda tíð sína; men fólk mítt kennir ikki rætt Harrans. **Jer. 8,7**

Sverri Kass

Tað stendur í Guds orði: »Um tú tí bert fram gávu tína á altarið, og tað har kemur tær í huga, at bróðir tín hevur okkurt ímóti tær, so lat gávu tína verða liggjandi har framman fyri altarinum og far fyrst avstað og verð samdur við bróður tín og kom síðan og ber fram gávu tína.«

»Tit eru salt jarðarinnar; men um saltið dovnar, hvørjum skal tað tá verða saltað við? Tað dugir einki longur uttan at verða blakað út og traðkað undir mannafótum.

Tit eru ljós heimsins. Ikki kann tann staður verða fjaldur, ið er uppi á fjøllum. Ikki heldur kveikja tey ljós og seta tað undir skeppumálið, men í ljósastakan; tá lýsir tað fyri øllum, ið inni eru í húsinum. Soleiðis lýsi ljós tykkara fyri fólki at tey mega síggja góðgerðir tykkara og æra faðir tykkara, sum er á himni.«

Pætur avnoktaði Jesus, men hann angraði sína synd og fekk fyrigeving, seinni vildi hann ikki avnokta Jesus, men mátti bøta við lívinum.

Aftaná at Jesus var upprisin segði hann við Pætur: »Sanniliga, sanniliga sigi eg tær, tá ið tú vart yngri, girdi tú teg sjálvan og gekst, hvar tú vildi; men tá ið tú verður gamal, skalt tú rætta út hendur tínar, og ein annar skal gyrða teg og føra teg hagar, sum tú ikki vilt.«
Men hetta segði hann fyri at merkja, við hvørjum deyða hann skuldi dýrmeta Gud. Og tá ið hann hevði sagt hetta, sigur hann við hann: »Fylg mær!«

Pætur doyði sum pínslarváttur og helst allir lærusveinarnir uttan Jóhannes.
Stefan var fyrsti pínslarváttur aftaná at Jesus var farin til himmals, og talið av pínslarváttum hevur verið stórt síðan tann dag, og tað talið er helst ikki fult enn.

Okkum nýtist ikki at fara longur aftur enn til seinasta veraldarbardaga, tá ið menniskju vórðu fastsett og eisini dripin fyri trúgv sína.

Eg skal taka eitt brot úr einari bók, sum ein týskur ungdóms-prestur hevur skrivað:

»Eg sat fleiri ferðir í fangatippi í Tí triðja ríkinum — fyri mína trúgv. Fongsulspresturin vitjaði meg og segði: »Tað eru lítlar vónir um at tú sleppur leysur.« So fór hann. Og eg var einsamallur eftir í fangarúminum. Tað var ógvuliga lítið. Høgt uppi var ein lítil gluggi. Tað var alt, og eg frysti. Tað hekk ein kaldur dámur yvir hesum, sum eg var komin inn í. Mær longdist heim til konuna, til míni børn, til mítt arbeiði, til mínar dreingir, eg var jú ungdómsprestur. Og har sat eg — uttan nakra vón um nakrantíð at sleppa leysur. Tá ið kvøldið kom, sakk eg saman í vónloysi. Eg veit ikki um tú nakrantíð í tínum lívi hevur kent slíkt vónloysi. Men júst tá — eg sigi tær satt, at soleiðis var tað — kom Jesus inn í mítt fangarúm! Hann livir!

Hann gongur ígjøgnum stongdar dyr. Hann gjørdi tað og vísti sín deyða á krossinum fyri mær. Og eg hoyrdi hansara orð í mítt oyra: »Eg eri hin góði hirðin. Hin góði hirðin setur lív sítt til fyri seyðirnar.« í tí løtu streymaði guddómligur kærleiki úr Jesu hondum til mín í slíkum máti, at eg toldi tað næstan ikki, tað bleiv næstan ov nógv fyri mítt hjarta. Og eg skilti: Tað finnist ein kærleiki, sum vit ikki hava uppiborið, sum vit ongan rætt hava til, men sum tó verður givin okkum.

Og hesin Jesu kærleikin er opin eisini fyri tær! Hví letur tú henda streym renna framvið tær? Hann vil streyma inn í títt hjarta.«

Martin Thomsen, sáli

# Stendur væl til við húsi tínum?

"Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt." Áps. 16,31.

Stendur væl til við manni tínum, konu tíni, børnum tínum, við teimum ymisku húsfólkunum? Um ikki, so stimbrar Skriftin okkum undurfult, tí hon sigur, at vit - um vit eru trúføst - mugu trúgva, at Gud á ein ella annan hátt, á einum ella øðrum staði og á einum ella øðrum degi vil føra tey inn til frelsunnar signing, so ættarringurin verður óbrotin í Himli.

Orðini, sum Paulus ápostul segði við hin angrandi fangavaktaran, vóru: "Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt." Hesi orðini læra okkum ikki bara, at ein menniskja, sum kemur til trúgv á Jesus Kristus, verður frelst; men tey læra okkum eisini, at um hann trýr og verður verandi trúgvur móti Gudi, vil Harrin frelsa húsfólk hansara. Tað er vilji Guds, at alt húskið hjá einum trúgvandi skal frelsast. Djevulin vil fegin upployssa heimini; men Gud frøir seg yvir heimini. Harrin lítur at húskinum sum einari eind, og Guds sanna meinigheit verður samanborin við eitt húski.

Men misskil meg nú ikki. Hvør einstakur í húskinum má sjálvandi angra synd sína og koma til persónliga trúgv á, at Jesus við deyða sínum bøtti fyri syndir okkara. Hann er hin einasti, sum kann frelsa. Men um vit vilja gera okkara part og venja trúgv okkara, til tey verða frelst, vil Harrin arbeiða við teimum, og um vit halda á at trúgva, vil Gud at enda føra tey inn í ríki sítt. Tað eru mong dømi um tað.

Hvørjir undurfullir møguleikar eru ikki í at trúgva, at bønin virkar! Hin sama trúgvin, sum gjørdi tað møguligt hjá tær og mær at blíva frelst, vil eisini føra húsfólk okkara fram til frelsandi trúgv.

Tað, at eitt heilt húski verður frelst, er í samljóð við Skriftina. Tak til dømis tilburðin við Nóa. "Tá segði Harrin við Nóa: "Gakk tú og alt húski títt inn í ørkina."" 1. Mós. 7,1. "Við trúgv var tað, at Nóa ... smíðaði ørk til bjargingar fyri húsfólk sítt." Hebr. 11,7. Hvat var Guds svar upp á trúgv Nóa? Gud gav honum øll húsfólk hansara, íroknað tær tríggjar sonarkonurnar.

Tað er møguligt, at henda framúrskarandi myndin av trúnni hjá einum einstøkum manni hevur borið signing ikki bara til tey, ið eru í slekt hvør við annan, men eisini til andalig skyld fólk soleiðis, sum tað hendi við Ábrahami. Av tí at ein maður kom til trúgv, verða øll Guds húsfólk signað - "tey, sum hava trúgv (Gal. 3,9)." Í 2. Mós. kap. 12 lesa vit um, tá ið páskirnar verða skipaðar. Her hava vit eina guddómliga mynd av trúnni hjá øllum húsfólkunum, og vit síggja, hvussu Gud frelsir Ísrael í húskjum. Hvør húsfaðir (v. 3) skuldi taka eitt lamb - eitt lamb fyri hvørt húski - slakta tað og taka nakað av blóðinum og smyrja tað upp á báðar durastavirnar og duratræið. Av tí at húsfaðirin trúði, var alt húskið frelst.

Í døminum um Ráhab hava vit ta sigrandi trúnna hjá eini dóttur. Hon ynskti sær ikki at blíva frelst einsamøll, men segði: "... berið mær prógv um, at tit vilja lata mær faðir og móður, brøður og systrar og alt húski teirra vera á lívi, og at tit

vilja bjarga okkum undan deyðanum!” Jósva 2,12-13. Hon vildi fegin síggja alla ætt sína frelsta. Hvat var Guds svar? “Men Jósva eirdi Ráhab skøkjuni og øllum ættarfólki hennara og øllum, sum hon átti.” Jósva 6,25.

Jósva er eitt annað dømi um, hvussu eitt heilt húski verður frelst. Í síðstu avbjóðing Ísraels sigur hann at enda: “Kjósið í dag, hvørjum tit vilja tæna ... men eg og hús mítt vilja tæna Harranum!” Jósva 24,15. Leyp hann framav við orðum sínum? Nei, tí Jósva setti ikki álit sítt á egnu børn síni, men á lyfti Guds.

Langt áðrenn lyftið varð givið tí filippinska fangavaktaranum, gjørdi Gud tað greitt, at trúgvin hjá einum av húsfólkunum fór at bera signing og at enda frelsu til tað húskið, tað var á hesum grundarlagi, at Jósva kundi siga tað, hann segði.

“Alt er møguligt fyri honum, sum trýr.” Mark. 9,23.

Í Nýggja Testamenti hava vit eina framúrskarandi mynd í Korneliusi. Hann trúði ikki bara, at hann sjálvur skuldi verða frelstur, men at tað eisini galt alt hús hansara. Í Ápostlasøguni kap. 10 lesa vit úrslitið av trúgv hansara.

Einaferð hoyrdi onkur Catherine Booth, móður ta viðgitnu Booth ættina í Frelsunarherinum, biðja: “Oh Harri, eg kann ikki standa framman fyri tær, um eg ikki fái húsfólk míni við,” og Gud frelsti Booth húskið og gav teimum eina undurfulla tænastu.

Jonathan Edwards, ein stórur prædikumaður, sum livdi fyri meir enn hundrað árum síðani, stóð fastur upp á Guds lyfti og kravdi, at øll ætt hansara mátti koma til trúgv, og fyri trimum ættarliðum síðani gjørdu øll í familjuni av at fylgja Kristusi. Vit mugu prísa Gudi fyri lyftini, og hvussu undurfullur hann er, og at hann svarar bønum okkara.

Paul Rader átti níggju systkin. Faðir hansara, sum var ein av Gudi náðaður prædikumaður, segði á deyðastrái við ein vinmann, sum brigslaði honum, at børn hansara ikki fylgdu Harranum: “Eg veit, at børn míni eru treisk; men eg havi gjørt mín part. Eg havi víst teimum ta leiðina, tey áttu at gingið, og eg trúgvi, at Gud at enda fer at frelsa tey øll tíggju, hann vil føra tey inn í ríki sítt.” Og øll í Rader ættini komu til trúgv á Gud.

Fell tí ikki í fátt. Kanska ert tú hin einasti í ættini, sum ert frelstur, men Guds lyfti halda. Tú sært tað kanska ikki, men tú kanst doyggja í trúnni og gleðast yvir, at ætt tín fer at blíva frelst.

“Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt.” Áps. 16,31.

“Gud er ikki maður, at hann gitur logið ... man hann siga nakað og ikki gera tað? Man hann tola nakað og ikki evna tað?” 4. Mós. 23,19.

“Eg vil ikki bróta sáttmála mín, ei broyta tað, ið mín muður hevur mælt.” Sálm. 89,35.

Mamma ein sjómann stóð við dyrnar uttan fyri hús síni, tá ið hon sá ein mann koma ímóti sær. Tá ið hann kom yvir til hennara, spurdi hann: “Eru tygum frú Brown?”

“Ja,” svaraði henda gráhærda, gamla mamman.

“So havi eg ring tíðindi til tygara. Sonur tygara, Jimmy, er sjólátin.”
Eina løtu fekk hvørki teirra orðið upp. So segði mamman, meðan hon royndi at halda grátinum aftur: “Sigið mær, hvussu hann doyði?”
“Eg vil helst sleppa undan at

siga tað," segði sjómaðurin.

"Jú, sigið mær tað kortini," segði hon.

Aftur sýtti hann; men hon bleiv við at krevja svar, til hann at enda við bivandi rødd segði: "Hann druknaði, meðan hann bannaði Gudi."

Hin neyðars mamman fór aftur eftir hæli, sum varð hon sligin; men so segði hon: "Sjálvt eftir tað, tygum hava sagt mær, trúgvi eg, at Gud frelsti hann, um so Harrin mátti møta honum undir aldunum."

Seks mánaðir gingu. Hon bað støðugt og trúði. Sonurin Jimmy hevði gjørt mammu síni sorg. Hon hevði uppalt hann at ganga í kirkju og í sunnudagsskúla; men hann var komin millum vánaligar vinir, var vorðin drykkjumaður og bannaði illa.

Jólaaftan fekk hon bræv. Skriftin á brævbjálvanum tóktist væl kend. Hon skræddi brævið upp og las ágrýtin: "Góða mamma, eg eri á lívi, og eg komi heim. Prísa Gudi! Hann hevur frelst bæði likam mítt og sál mína. Vit síggjast skjótt. So skal eg siga tær frá øllum. Tín elskaði sonur Jimmy."

Nakrar dagar seinni bankaði á dyrnar, og tað var hjartanemandi, tá ið tann gamla mamman og leingi saknaði sonur hennara hittust. Tá ið tær fyrstu glaðu heilsanirnar vóru av, segði Jimmy Brown, hvussu tað bar til, at hann enn var á lívi. Tá ið hann var um at drukna, hevði hann fingið fatur á einum rekandi bjálka, og hann krøkti seg í hann, og tað eydnaðist honum eftir nógvum tímum at svimja í land. Ein fiskimaður fann hann og bar hann inn í smáttu sína. Í fleiri vikur lá hann fyri deyðanum, og tá ið hann so smátt fór at batna, var hann ov veikur at fara undir ta longu ferðina heim. Men langt um leingi - eftir at hann hevði vunnið sær nakað av peningi við útróðri - eydnaðist honum at koma heim.

"Men Jimmy," segði mamma hansara, "hvussu bar tað til, at tú komst at kenna Jesus sum tín Frelsara?"

"Mamma," svaraði hann, "Harrin fann meg undir aldunum." Mamman hvakk við, tá ið hon hoyrdi tey somu orðini, sum hon sjálv hevði nýtt.

Jimmy helt á: "Tað var, sum sá eg alt synduga lív mítt, og so rópti eg til Harrans: "Frels meg," og tað gjørdi hann."

"Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt."

Effie Campbell umsetti.

## Nýggir haldarar

Eg ynski at halda "Kirkjuligt Missiónsblað".

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Postnr. og bygd/býur: ______________________________

Undirskrift: ______________________________

*At senda til:*
Kirkjuligt Missiónsblað, Purkugerði 7, FO-100 Tórshavn

# At fara til verka í áliti til Harran

Soleiðis sigur Harri herliðanna: Hetta fólk sigur: »Stundin er enn ikki komin til at endurreisa hús Harrans.« Haggai 1,2.

HESI orð komu einaferð til mín gjøgnum ein mann, og tað er líkasum tey hava fylgt mær, og eg má siga, at tey hava verið mær til stóra signing og eru tað enn, líka sum alt Harrans orð.

Lesa vit hetta kapitlið, so síggja vit, at Gud hevði aðrar tankar, og tað er tað, sum okkum tørvar at biðja um, at hann má kunnar gera okkum vegir sínar, og tað má vera ígjøgnum Harrans orð.

Gud er bæði á himnum og her niðri á jørð (Josva 2,11), og Harrans orð kom við Haggai profeti soljóðandi: Er tað stund hjá tykkum at búgva í bróstaðum húsum, meðan hetta húsið liggur avtoftað? (vers 3 og 4). Her er tað talan um at byggja Harrans hús, og tað er tað, sum Gud væntar av okkum, sum kalla okkum eitt kristið fólk.

Aftur nú, eg sat og lurtaði eftir Hans Jákupi Ellingsgaard, sum nýliga er afturkomin úr Etiopiu, komu hesi orð til mín, og kanska hava tey ongantíð talað so nógv til mín fyrr. Her er sanniliga talan um at byggja Harrans hús, og mátti Gud hjálpt okkum at kent okkara ábyrgd, bæði hvat ið viðvíkur ofri og forbøn. Her haldi eg, at orðini hjá profetinum raka okkum dygt.

Vit kunnu sanniliga siga, at vit búgva í bróstaðum húsum, meðan Harrans hús har úti liggur avðtoftað. Vit her heima í okkara landi hava tað ógvuðliga gott; men lat okkum ikki gloyma, at tað, sum vit hava, hava vit fingið frá Gudi.

Hetta fólk, sum her er talan um, sá bert seg sjálvan, og roknaði ikki við Gudi, og tá kemur eingin signing burturúr. (Sálmur 127,2).

Tað gleddi meg at hoyra, hvussu trúgv tey eru har úti, og hvat álit tey hava til Harran; og sanniliga, tey verða ikki svikin, tey, sum rokna við Gudi.

Tá ið Hans Jákup kom upp á mál at byggja eina missiónsðstøð har úti, tá rann mær í huga einaferð eg var inni hjá einum gomlum, trúgvandi vini, sum hevur verið ein íðin maður fyri Harrans sak, og maðurin er enn á lívi. Hansara ynski var, at fáa reist eitt hús, hvar ið Harrans orð kundi verða boðað; men peningavánirnar vóru ikki góðar tá. Hann fór so í bøn til Gud, og hetta orðið hjá Haggai profeti kom tá til hansara: »Farið niðan í fjøllini eftir viði og byggið tempul, so at eg kann fáa sóma, og eg skal vísa mín heiður! sigur Harrin.« Og so varð farið til verka, og Harrin arbeiddi við, og peningðurin kom inn, sumt á ein slíkan hátt, sum eingin hevði hugsað sær. Soleiðis er Gud, ein undurfullur Gud, og tað er hetta, sum gevur styrki.

Tað er serliga hetta 9. versið, sum eg haldi talar so álvarsliga til okkum. Skulu vit vænta nakra signing frá Harranum, so mugu vit gera nakað sjálvi. Ikki so, at vit av okkum sjálvum eru dugulig, sum Paulus sigur; men dugnaskapur okkara er frá Gudi. Vit mugu vera villig amboð, so at Harrin fær brúkt okkum í síni tænastu. Hetta eru treytirnar fyri, at Harrin kann vísa sín heiður.

Tað er ikki altíð tað nógva og tað stóra, sum fær signing frá Gudi; tað síggja vit, tá ið vit lesa 6. versið; hann segði um hetta fólk, at tey sáaðu mikið, men lítið kom til høldar. Og hvat var orsøkin? Jú, orsøkin var tann, at Harrans hús lá avtoftað, meðan hvør starvaði fyri sítt egna hús. Her hjálpir eingin menniskjanslig megi; her er tað, sum sálmaskaldið syngur:

Foragter ej de ringe dage; her intet sker ved kæmpehand; her virkes ej ved bulder fage, men alt i stilhed af min Ånd; sa siger Herren stærk og bold, som ene alting har i vold.

Harrans lyfti til okkara eru stór, um vit geva hansara orði gætur. Lesa vit Jesaja 49,6, so mugu vit siga Gudi tøkk fyri, at vit kunnu vera við. Hetta varð ta, sum vit vórðu kallaði til, og um vit vilja vera hesum kalli lýðin, so vil Harrin leggja sína signing til, og tað fylgir stór gleði við.

*Jóhan Davidsen. 1974*

# Depressiónin hvarv

Í Amerika gera tey allar møguligar royndir og kanningar. Millum annað hava tey roynt at latið fólk við depressión lesa 54. kapittul hjá Jesaja eina ferð um vikuna í eitt ár. Tá vísti tað seg, at depressiónin hvarv.

Hetta kapitlið er eisini serliga gott. Um tú á ungum árum hevur kent teg lítisverda og hevur følt teg svikna og hugstoytta, lurta so: "Óttast ikki, tí at ikki skalt tú verða til skammar; lat ikki háð bíta á tær, tí at skemd skal ikki meira verða tær fyri. Tí at tú skalt gloyma lítisvirði ungdóms tíns og ikki minnast vanvirðing einkjudóms tíns. Tí at hann, sum skapaði teg, er maður tín; navn hans er Harri herliðanna; loysnari tín er Ísraels heilagi, hann, sum nevnist Gud alrar jarðar. Svikin og hugstoytt satst tú - men Harrin kallar teg sína. "Man maður havna sínum ungdóms drósi?" ljóðar tað frá Gudi tínum." (v. 4-6)

Og víðari lesa vit: "Tí at um so fjøllini vikast og heyggjarnir ridla, skal tó kærleiki mín ikki gretta, sigur Harrin, miskunnari tín. Tú eyma, stormbarda, ugganarleysa! Sí, eg byggi teg upp við smáragdum og laði grundvøll tín av saffirsteinum, geri múrtindar tínar av rubinum og lið tíni av karfunkulsteinum og allan tí borgargarð av dýrum steinum. Tá verða øll børn tíni lærusveinar Harrans og skulu njóta miklan frið." (v. 10-13)

Kapittulin endar við hesum lyftinum: "Einki svørð, ið smíðað verður ímóti tær, skal fáa sigur; hvørja tungu, ið talar ímóti tær, skalt tú sakfella. Hetta er lutur tænara Harrans, tað rættlæti, sum teir fáa hjá mær, sigur Harrin."

Effie Campbell.

# Angistin mátti víkja

"Tí at ikki gav Gud okkum mótloysis anda, men kraftar og kærleiks og hóvsemis anda." 2. Tim. 1,7.

Ein kona vitnaði á einum Aglowmøti: "Fyri nógvum árum síðani gjørdist eg brádliga so bangin. Eg visti ikki, hví eg var bangin. Tað var, sum hvør kykna í kroppinum skalv. Eitt kvøldið, tá ið eg hevði náttarvakt, kom hetta aftur á meg. Eg fall á knæ og bað: "Harri, nú mást tú hjálpa mær, annars kann eg ikki virka, hvørki sum menniskja ella sjúkrasystur."

Í somu løtu komu tvey skriststøð fram fyri meg. 1) "Eg eri við tykkum ALLAR dagar", (Matt. 28,20) og 2) "Ótti er ikki í kærleikanum, men hin fullkomni kærleikin rekur út óttan." 1. Jóh. 4,18.

Eg bleiv umvend fyri 30 árum síðani, tá varð ofta havt á lofti og stórur dentur lagdur á hetta, at tú skalt standa fast á bíbliulyftunum. Óttin kom aftur nakrar fáar ferðir; men tá tók eg hesi bæði skriftstøðini og las tey hart upp fyri Djevlinum. Tá hvarv óttin, og síðani havi eg verið frísk. Jesus hevur sett meg í frælsi.

Fyri nøkrum árum síðani var ein sendirøð um sálarfrøði hvørt hóskvøld í sjónvarpinum. Eg gekk í bindiklubb júst hetta kvøldið, so eg sá ikki hesar sendingar. Men so eitt hóskvøld var eingin bindiklubbur, og tá hugsaði eg, at nú skuldi eg fara at hyggja at hesari sendingini.

Ein maður steig fram og greiddi frá, hvussu hann hevði havt tað. Eg kendi alt aftur, tað var júst soleiðis, ið eg hevði havt tað. Hetta var angistneurosa, segði hann. So greiddi hann frá, at konan fór frá sær og børnini við, og hann

var innlagdur á eitt sálarsjúkrahús. Eg minnist ikki, um hann var har í 10 ella 20 ár.

Tá hugsaði eg: "So gott er tað at eiga Jesus í hjartanum og kunna søkja sær hjálp haðani. Eg varð loyst eftir stuttari tíð, meðan hann lá í nógv ár á sjúkrahúsi og misti alt. Jesus er bara so undurfullur. Hann segði jú eisini við hin heimagangandi sonin: "Alt mítt er títt!" Hin heimagangandi sonurin kundi havt slaktað sær ein gøðingarkálv hvønn einasta dag, um hann hevði viljað!" Har endar vitnisburðurin.

Gud bjóðar fólkinum heilsubót og lekidóm: "Sí, eg lati sárini ... batna og grógva aftur; eg gevi teimum heilsubót og lati upp fyri teimum ríkidømi av sonnum friði." Jer. 33,6.

Hvaðani kemur sjúka? Ja, hon kemur ikki frá Gudi, tí uppi í Himli er eingin sjúka. Tvørturímóti sigur Skriftin: "Hvør ein góð gáva og hvør ein fullkomin gáva er omanfrá og kemur niður frá faðir ljósanna." Ják. 1,17.

Bíblian lærir, at tað er okkara fíggindi, Djevulin, sum kastar sjúkur á fólk: "Gud salvaði hann (Jesus úr Nasaret) við heilagum anda og kraft, hann sum gekk umkring og gjørdi væl og grøddi øll, sum vóru illa stødd av djevlinum." Áps. 10,38. "Men henda konan, sum er dóttir Ábrahams, og sum Sátan hevur hildið bundna í fjøtrum, og tað í átjan ár, átti hon ikki at verða loyst úr hesum bandi ein hvíludag?" Luk. 13,16.

Tað er Guds vilji, at vit skulu hava eina sunna sál í einum sunnum likami: "Elskaði mín, eg ynski, at tað í øllum lutum má vita tær væl við, og at tú mást hava heilsuna, líkasum tað veit sál tíni væl við." 3. Jóh. 1,2. Gud sigur um seg sjálvan: "Eg, Harrin, eri tann, ið grøðir teg." 2. Mós. 15,26. Jesaja profetur sigur: " Várir sjúkdómar vóru tað, sum hann bar, og várar kvalir, sum hann legði á seg; av sárum hansara fingu vit heilsubót." Jes. 53,4-5. Tá Jesus bar sjúkur okkara, skuldi ikki verið neyðugt hjá okkum at borið tær við; tí so hevur hann borið tær til fánýtis. Bíblian sigur okkum, at Gud tók várar ilskur og sjúkur og legði tær á Jesus: "Hann tók ilskur várar, og sjúkur várar bar hann." Matt. 8,17.

Ger sum henda sjúkrasystirin. Statt fast á Guds lyftum og statt ímóti øllum sjúkueyðkennum, symptomum, sum hin Óndi plágar teg við, tí Jesus hevur av sonnum sett teg í frælsi, so bið hin Ónda víkja frá tær í Jesu navni.

Effie Campbell.

# Menniskjan spáar - men Gud ræður

Í 1913 sat ein barónur, sum kallaðist Lord Rothschild, í París. Hann var ikki ein trúgvandi á tann hátt, sum vit leggja í hetta orðið í dag, men hann trúði Guds orði. Tá fær hann eina sannføring ella eina opinbering í sínum hjarta, at fyrst fer ein ræðuligur bardagi at bresta á (fyrri veraldarbardagi 1914-18), so verður friður eina tíð, men síðani verður ein hervilig jødatýning (holocaust).

Hann sendir tí eitt fjarrit til turkiska sultanin, sum stýrdi øllum tí Osmanniska ríkinum. Hetta ríkið fevndi um stór øki í Afrika og Asia og eisini Heilaga Landið. Í fjarritinum spurdi hann, um hann kundi sleppa at keypa Palestina, so jødar kundu koma har at búseta seg.

Hann fekk eitt fjarrit aftur. Í tí stóð: "Tá ið vatnið í Nilánni rennur inn í Jerusalem, skalt tú sleppa at keypa Palestina." Hetta ljóðaði heldur løgið; men Rothschild var jødi, so hann skilti málburðin hjá eysturlendinginum. Har, sum Níláin rennur út, er hæddin ájøvn havinum, og Jerusalem liggur 800 m yvir havinum. Vatn rennur ikki uppeftir, og tí merkti tað, sum sultanurin ætlaði sær at siga, at líka so lítið sum vatn kann renna uppeftir, líka so lítið skalt tu sleppa at keypa Palestina.

Men eitt orðtak sigur: Menniskjan spáar, men Gud ræður. Og soleiðis kom at gangast her. Undir fyrra veraldarbardaga kom Ongland í kríggj móti Turkalandi, og Allenby herhøvdingi fekk til uppgávu at fría Palestina. Herur hansara taldi 40.000 menn. Allenby gekk undir

navninum “oyðimarkarrottan”. Hann var ein persónligur kristin.

Hann dugdi beinanvegin at síggja, at hetta fór at verða eitt tekniskt kríggj, hetta fór at verða eitt kríggj um vatn, tí turkar høvdu um hetta mundið so gamalslig vápn, og teir høvdu skinnsekkir at goyma vatnið í. Hann bað tí verkfrøðingadeildina leggja ein vatnleidning úr El Katara, yvir Suez og inn í oyðimørkina.

So hvørt sum Allenby tók seg fram, longdu teir um henda vatnleidning. Turkar blivu við at taka seg aftur við teirri vón, at teir fóru at finna vatn; men so var ikki. Bretar harafturímóti høvdu alla tíðina fírskt vatn.

Tann 9. desember í 1917 stóðu teir á Oljufjallinum og sóu inn yvir heilaga býin, Jerusalem, sum Dávid kongur hevði bygt. Her hevði Ábraham skula ofrað Ísak, einasta son sín; men Gud steðgaði honum. Staðin fyri læt Gud einasta son sín doyggja fyri alla mannaættina.

Tá fekk Allenby samvitskubit. “Eg kann ikki seta mínar vanhalgaðu kanónir upp móti Jerusalem,” segði hann við herovastar sínar. “Kríggj er kríggj!” svaraðu teir aftur, “kríggj er kríggj!”

So sendi Allenby eitt fjarrit til George 5. av Onglandi. Hann var abbi Elisabeth, sum er Onglands drotning í dag. “Eg eri kristin. Mín samvitska loyvir mær ikki at bumba Heilaga býin, Jerusalem. Hvat skal eg gera?”

Svarið, hann fekk, var hetta: “Make it a matter of prayer.” Ger tað til eitt bønarevnið.

Edmund Allenby bað so allar hermenn sínar fara niður á knæ, tí tað vóru boðini frá kongi. Teir gjørdu tað við ringum tannabiti; men teir máttu akta kongsins boð. Á dett bønarmøti, 40.000 menn á knøum.

Tá hendi nakað. Graml hoyrdist um, at ein annar bretskur herur við Lawrence á odda lá hinumegin Jerusalem. Tað var ikki satt, og hvør ið var komin við hesum tíðindum, veit eingin, hóast teir hava kannað søgulig skjøl. Nú gjørdust turkar bangnir, teir hildu, at teir vóru fangaðir í einari fellu millum tveir herar. Teir hildu tí til beins og kvikaðu sær burtur.

Tá kom borgarstjórin í Jerusalem út við einum hvítum flaggi, og allir herovastarnir fóru ríðandi á hvítum hestum yvir ímóti Jerusalem. Tað var siður hjá herovastum tá á døgum. Tá ið teir komu til tað portrið, har Jesus reið inn á einum asnafyli, fór Allenby av hestinum og bað hinar gera tað sama. “Tí,” segði hann, “tað er bara ein, sum er verdur at ríða á hvítum hesti inn gjøgnum hetta portrið, og tað er Jesus. Tað stendur í Opinberingini í tí 19. kapitlinum, at Jesus skal koma ríðandi á einum hvítum hesti.” So fóru teir til gongu inn gjøgnum portrið og yvir til grátimúrin.

Allenby bað síðani verkfrøðingarnar leggja vatnleidningin inn í sjálvan Jerusalem, og tá ið tað fríska vatnið veldi út gjøgnum pumpurnar, komu boð frá Balfour, at nú var Palestina frítt, og jødar kundu búseta seg har, sum teir vildu.

Ja, so sanniliga, menniskjan spáar, men tað er Gud, ið ræður. Sultanurin vildi ikki selja Heilaga Landið, fyrr enn vatnið úr Nílánni spríkti inni í Jerusalem. Nú rann vatnið úr Nílánni inni í heilaga býnum, og jødar fingu Palestina frítt uttan at gjalda eitt einasta oyra. Jødarnir eiga lyftini, og tí nýtast teir ikki at óttast.

Effie Campbell umsetti.

# Herja á í bønini

Á einum Aglowmøti segði ein sjúkrasystir frá einari bønarráðstevnu, sum hon hevði verið á yviri í Tóndheimi á sumri 2008. Henda ráðstevnan var fyri læknar, sum bóðu fyri sjúklingum. Sjúkrasystrar, heilsusystrar, jarðarmøður og onnur innan heilsuverkið vóru eisini við. Tað kom týðiliga fram, hvussu einsligir læknarnir kendu seg. Henda ráðstevnan skuldi vera fyri at styrkja teir í tænastuni. Her sóu teir, at tað var ikki bara hvør einstakur teirra, sum bað, men at aðrir í mongum londum stóðu júst í somu tænastuni sum teir.

Ellivu sjúkrasøgur vórðu lagdar fram á ráðstevnuni. Hetta vóru frásagnir um álvarsliga sjúk fólk, sum heilsuverkið hevði givið upp, men sum síðani blivu grødd, tá ið trúgvandi læknar bóðu fyri teimum.

Um ein sjúkrasøga skuldi fáa loyvi at verða løgd fram, máttu øll pappírini fylgja við, sum vístu allar blóðroyndir og allar aðrar kanningar, ið prógvaðu, at hesin persónur var álvarsliga sjúkur. Síðani skuldu pappírini frá somu kanningum, eftir at sjúklingurin var grøddur, vísast fram. Av hesum sæst, at ikki ein og hvør sjúkrasøga slapp at verða framløgd, men bara tær, ið kundu staðfestast og prógvast gjøgnum royndir undan og eftir bønini, sluppu gjøgnum nálareygað.

Ein ógvuliga kendur hjartaserfrøðingur í Norðuramerika var á stevnuni. Hann segði frá, at hann framdi skurðviðgerðir, brúkti heilivág og bað fyri sjúklingunum. Í fyrstani, tá ið hann fór undir at biðja, hendi ikki so nógv. Men tá ið tað frættist, at hann bað, streymaðu fólk til, og so við og við komu fleiri bønarsvør. Umleið 25 % av teimum, sum biðið verður fyri, verða grødd. Henda tænastan gjørdist so umfatandi, at hann setti ein prest í starv, sum skuldi biðja fyri teimum sjúku, sum ynsktu tað.

Ein dagin, tá ið hesin læknin ikki var til arbeiðis, skuldu læknarnir skurðviðgera ein mann, sum var álvarsliga sjúkur. Har vóru fleiri læknar hjástaddir og einar seks sjúkrasystrar; men maðurin fekk hjartasteðg og doyði.

Teir arbeiddu dúgliga upp á hann og góvu honum elektriskan stoyt; men har hendi einki, og meðan teir framhaldandi arbeiddu upp á hann, so sveittin lak av teimum, varð boð sent eftir hesum umrødda hjartaserfrøðingi, tí hann var so høgt mettur millum sínar starvsfelagar.

Hann kom og kannaði arbeiðsgongdina, men sá, at alt var gjørt eftir bókini. Sjúklingurin hevði nú ligið deyður í 40 min. Har var ikki meir at gera. Læknarnir og sjúkrasystrarnar fóru, og at enda var bara ein sjúkrasystir og hesin hjartaserfrøðingurin eftir.

Tá ið hjartalæknin var á veg út gjøgnum dyrnar, talaði Heilagi Andin til hansara og segði: “Far inn aftur. Bið eina ferð afturat og gev manninum elektriskan stoyt, tí eg vil lata hann koma til lívs aftur.”

“Harri, tað kanst tú ikki meina. Maðurin hevur verið deyður í 40 min. Alla hesa tíð er einki súrevni komið til heilan. Livnar hann upp aftur nú, verður hann ikki rættsiktaður.”

Men læknin valdi at vera lýðin. Hann fór inn aftur og segði við sjúkrasystrina: “Ger alt til reiðar. Hann skal hava ein stoyt afturat.”

Hon hugdi bilsin upp á hann og segði: “Tað kanst tú ikki meina!” Men hon mátti gera, sum hann beyð, tí hann hevði stóran myndugleika.

Læknin tók klæðið burtur av andlitinum, bað fyri honum og gav honum so stoyt. Sjúklingurin vaknaði og var heilt normalur.

Tá ið læknin gekk út gjøgnum dyrnar, visti hann við vissu, at onkur persónur hevði biðið nógv fyri hesum manni, tí annars kundi eitt so stórt undur ikki henda.

Seinni kom fram, at kona henda mann var trúgvandi, og hon hevði trúliga biðið fyri honum í 25 ár, at Harrin mátti frelsa hann. Tá ið hann skuldi leggjast undir skurð, fór dóttirin inn á sjúkrahúsið og inn í eina stovu, sum var uppat stovuni, har pápin lá. Har fór hon í bøn fyri pápa sínum.

Eftir at pápin var komin til lívs aftur, greiddi hesin óumvendi maðurin frá, hvat ið hann hevði upplivað, meðan hann var úr kroppinum. Hann var púra einsamallur í einum tøttum, svørtum myrkri. So merkti hann, at onkur bant eitt tog allan vegin rundan um hann og blakaði hann á ein ruskdunga. Tá ið hann rakti ruskdungan, vaknaði hann aftur til lívs.

Hugsa tær, har gongur konan og biður fyri honum. Hon sær einki úrslit, men heldur trúliga á í 25 ár, og tá kemur svarið eftir hesum undarliga vegi. Bønirnar blíva ikki burtur, men verða savnaðar í gullskálum í Himli, og svarið fer at koma. Herja tú tí á í bønini fyri tínum kæru, og lat ongan og einki steðga tær.

“Teir høvdu ... gullskálir, fullar av roykilsi, og tað eru bønir teirra heilagu.” Opb. 5,8.

Effie Campbell.

# Finst nøkur fyrigeving fyri mína synd?

TAÐ tykist, sum at tey eru ikki so fá, sum eru bundin og plága av eini ávísari synd, sum tey ikki vita um tað er møguligt at fáa fyrigeving fyri hjá Gudi. Tú veitst sjálvur, hvør ið henda syndin er; hon hevur fylgt tær sum ein marra og veitt tær manga náttarvøku, og hon hevur tikist bæði mátt og frímóð frá tær. Hetta er *tín* synd og *títt* fall, og tað ber ikki til at tveita skuldina á onnur. Tú hevur mangan spurt teg sjálvan: »Hví gjørdi eg hetta? Og finst nakar møguleiki fyri at gera tað gott aftur, ella noyðist eg at bera fylgjurnar og arrini eftir syndina alt lívið ígjøgnum og í ævinleikanum?«

Hjá mongum eru hetta syndir, sum eru framdar í ungdómsárunum, og sum støðugt koma fram í minninum, hóast eingin annar veit um tær. Dávid biður Gud um, at hann má fyrigeva honum hansara ungdóms syndir.

Hjá øðrum eru tað syndir, sum hava havt sjónskar avleiðingar sum øll kundu síggja.

Kanska vóru tað arvaviðurskifti sum gjørdu, at klandur kom í millum systkin, ella eitt fall var orsøkin til, at heimið fór í tvíningar.

Tú, sum lesur hesar reglur, veitst sjálvur, hvat ið er tín neyð og ákæra.

*Er nøkur fyrigeving fyri hesa synd?*

Guds orð sigur: Ja! »Blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá *allari* synd.« 1. Jóhs. 1,7.

Og tú skalt leggja til merkis, at Guds orð talar týðiliga bæði um føll og um synd.

Jákup lumpaði sær bæði frumburðarrættin og mangt annað til. Men Gud møtti honum og bardist við hann og vann. Eftir tann dagin vóru syndirnar fyrigivnar, og Jákup var ein nýggjur og eyðmjúkur maður. Eisini Dávid fall djúpt í synd. Hann fylgdi sínum egnu lystum og livdi saman við konuni hjá øðrum manni, og haraftrat royndi hann við snildum at krógva tað á ein slíkan hátt, at tað varð øðrum manni at bana.

Men Harrin sendi profetin til hansara, og Dávid sigur um seg sjálvan í Sálma 32,5: »Tá segði eg tær mína synd og duldi ei misbrot míni, — og tú, tú fyrigavst mær syndasekt mína.«

Pætur svór uppá, at hann kendi ikki Jesus, og fór síðani út í myrkrið; men Jesus leitaði lærusvein sín upp og fyrigav honum og reisti hann aftur á føtur.

Og eitt skalt tú leggja til merkis aftrat, at tey, sum Guds orð sigur fullu í synd, bóru seg ikki øll at á sama hátt sum Pætur. Summi gjørdu sum Káin. Hann flýggjaði burtur frá Gudi berandi sína egnu synd. Tað gjørdi Ísrael eisini í iðrunarloysi sínum, og tey spjaddust út um alla jørðina. Og um Judas sigur bíblian, at hann fór burtur og hongdi seg.

Men øll tey, sum lótu Harran sleppa til bæði við dóminum yvir syndina og við tilboðnum um frelsu og fyrigeving, fingu loyvi at uppliva, at miskunnsemi Guds er endaleyst, og at hann fyrigevur útum alt mark og mið og uttan at vit eiga tað uppiborið.

Hetta er leiðin, sum eisini tú eigur at ganga, ið spyrst, um tað finst fyrigeving fyri tína synd.

Tú eigur at taka dómin inn yvir teg og siga við Dávidi: »Eina móti tær havi eg syndað og gjørt tað, ið tær tykir ilt.« Sálmur 51,6.

Tað eru ikki avleiðingarnar av syndini her í lívinum, sum eru tað ringasta. Dávid noyddist at síggja son sín doyggja, og kenna avleiðingarnar av synd síni. Tað skalt tú kanska eisini bera; men syndaskuldina og revsingina skalt tú sleppa frá at bera, tí at tað varð alt lagt á Jesus. Og Jesus var frelsaranavn hansara, tá ið hann kom í heimin, tí hann skuldi frelsa fólk sítt frá syndum teirra. Matt. 1,21. Tað gjørdi hann, tá ið hann gekk inn undir syndaskuld okkara. Jóh. 1,29. Hann bar syndir okkara á likami sínum upp á træið, og har vóru eisini tínar syndir við.

Gud fyrigevur tær syndir tínar av tí, at Jesus hevur goldið fyri tær við blóði sínum.

Endurloysingin er í blóði hansara, og syndanna fyrigeving samsvarandi náðiríkidømi hansara. Efes. **1,7-**

Evangeliið er gleðiboðskapurin um syndanna fyrigeving, sum eigur at verða róptur út um allan heimin. Luk. 24,47.

Gud fyrigevur tær ikki syndirnar av teirri orsøk, at tað finst nakað grundarlag hjá tær ella í lívi tínum fyri slíkari fyrigeving. Hann fyrigevur tær fyri sína egnu skuld. Jesaja 43,25. Hann fyrigevur tær bert av teirri orsøk, at Jesus hevur borið revsingina og dómin fyri syndina — og goldið skuld tína hjá Gudi.

Og har det nu virket
så. kraftigt hos Gud,
at helt han tilfreds kunne blive,
so. lad du og dermed dig nøje!

*Gudmund Vinskei*

# Tvíburarnir

Tað vóru einaferð einir tvíburar, ein genta og ein drongur um sjey ára aldur, sum itu Kári og Katrin. Tey líktust sera nógv, og vóru altíð saman.

Ein dagin var Katrin fyri eini ólukku og fekk álvarsligan skaða. Hon var koyrd á sjúkrahúsið og kom beinanvegin undir læknahond, tí hon hevði mist sera nógv blóð. Fyri at hon ikki skuldi doyggja, mátti hon fáa blóð frá onkrum, sum hevði sama blóðflokk sum hon, og hon hevði nevniliga ein blóðflokk, sum ikki var so vanligur.

Úti í bíðirúminum sótu Kári og mamman og bíðaðu, og tey vóru bæði bangin og kedd og bóðu Gud um, at alt mátti gangast væl.

Læknin bað tey koma inn á skrivstovu sína, og í fyrstuni tosaði hann mest við mammuna, men so fór hann eisini at greiða Kára frá. Hann segði honum, at øll menniskju mugu hava blóð fyri at kunna liva, og at Katrin so skjótt sum møguligt mátti fáa blóð frá onkrum øðrum, um hon ikki skuldi doyggja. Læknin visti, at Kári hevði sama sjáldsama blóðflokk sum Katrin og spurdi hann, um hann ikki kundi geva systrini blóð frá sær. Hann vissaði hann um, at hann ikki fór at fáa ilt av tí. Síðani greiddi hann eisini frá ymiskum øðrum, men tað skilti Kári ikki, og tá ið læknin aftur spurdi hann, um hann kundi geva systrini blóð, var hann ikki vísur í, hvat hann skuldi gera, men tá ið mamman nikkaði samtykkjandi til hansara og segði, at tað nokk skuldi ganga, játtaði Kári.

Nakrar minuttir seinni hevði læknin longu tappað ein hálvan litur av blóði av Kára, og hann fekk als ikki ilt. Síðani fóru Kári og mamman til hús, Kári setti seg inn í stovuna, meðan mamman fór at gera náttverða. Tá ið hon var liðug, rópti hon á Kára, men hann kom ikki inn í køkin. So fór hon inn í stovuna at vita, hvat hann gjørdi harinni. Men hann sat bara í ruggustólinum og ruggaði. Har hevði hann sitið í ein heilan tíma. Hann legði als ikki merki til, at mamman var komin inn.

Mamman spurdi hann so, hví hann bara sat har, og um hann ikki kom at fáa sær at eta. “Jamen, nær hendir tað?”, spurdi Kári. “Hvat?”, spurdi mamman. “Nær fari eg at doyggja?”. “Doyggja, hví sigur tú tað?”. Jú, læknin segði, at um vit ikki hava blóð, so doyggja vit, og nú havi eg givið Katrini mítt.

Tá ið mamman hoyrdi hetta var hon um at gráta. Hon tók Kára upp í fangið og greiddi honum frá, at hann als ikki fór at doyggja. At tað ikki var vandamikið at geva nakað av blóðið, og at hann við at hava givið systrini eitt sindur hevði bjargað henni.

Kári var fúsur at ofra lív sítt fyri at bjarga systur síni, men til alla lukku var tað ikki neyðugt. Hann elskaði systur sína sera høgt. Tað er ikki ofta, at vit møta einum so stórum kærleika, men Jesus elskaði okkum menniskju so høgt, at hann vildi doyggja, soleiðis at vit kundu fáa ævigt lív. Har var nakað av blóðið ikki nóg mikið. Hann læt alt sítt blóð renna á krossinum fyri at bjarga okkum.

Leystliga umsett Petra Gregersen

# BARNASÍÐAN

## Ábraham

Petra Gregersen

Tá ið Guð hevði blandað tungumálini á jørðini, kendu fólkini seg ikki longur so knýtt at hvørjum øðrum og fluttu í ymsar ættir. Sum tíðin leið, litu nógv ikki longur á Guð og dyrkaðu aðrar gudar.

Guð sá, at hann mátti gera okkurt. Hann fann ein mann, sum æt Ábraham, ið búði í eini bygd, har Irak liggur í dag. Ábraham hevur óivað búð har saman við konu síni og allari familjuni og átt nógv djór, so tað hevur kanska ikki verið so lætt hjá honum at flyta haðani. Men Guð bað hann fara frá sínum og flyta til eitt annað land. Hann lovaði honum eitt gott og gróðrarríkt land, nógvar eftirkomarar og lovaði at vælsigna hann.

Ábraham man hava hildið, at lyftini hava verið góð, tí hann fór avstað uttan at vita hvar, men leit á Guð og visti, at hann helt síni lyfti. Guð helt eisini síni lyfti. Ábraham kom til eitt gott land, har jørðin var góð at dyrka, og hann hevði tað gott.



Men tað sá ikki út sum um, at hann fór at fáa eftirkomarar, tí hann og konan Sára fingu ikki nøkur børn. Sjálvt um Ábraham nærkaðist teimum hundrað, so leit hann kortini á, at hann fór at fáa børn, og tað fekk hann eisini. Tá ið hann og Sára vóru avgomul, fingu tey ein son, og tá vóru tey ógvuliga glað. Bæði fyri at fáa sonin og tí at lyfti Guðs nú fór at ganga út, at Ábraham skuldi fáa nógvar eftirkomarar. Tey kallaðu sonin Ísak.



Tá ið Ísak var vorðin eitt sindur stórur, segði Guð við Ábraham, at hann ynskti, at Ísak skuldi ofrast. Hvat man Ábraham hava hugsað tá? Fyri tað fyrsta vóru Ábraham og Sára so góð við Ísak, og hvussu kundi Ábraham so fáa nógvar eftirkomarar, sum Guð hevði lovað, um Ísak skuldi ofrast?

# BARNASÍÐAN



Vit kundu kanska hildið, at Ábraham fór at siga nei. Men tað gjørdi hann ikki. Tað hevur ikki verið lætt hjá honum, men hann leit fult og fast á Gud, og tá ið Guð segði tað, so vildi hann vera Honum lýðin. Hann bað Ísak koma við sær niðan á Moria fjall. Teir skuldu niðan at ofra. Vanligt var tá at ofra eitt lamb fyri at fáa syndanna fyrigeving. Lambið skuldi leggjast á altarið og verða brent á offurstaðnum, men í dag var tað so Ísak, sum skuldi upp á altarið. Tá ið Ábraham so skuldi fara at ofra Ísak, steðgaði Gud honum og bað hann ístaðin ofra ein veðr. Tá munnu Ábraham og Ísak hava verið glaðir.



So kunnu vit spyrja, hví Guð gjørdi hetta. Jú, hann vildi kanna, hvussu stóra trúgv Ábraham hevði, um hann leit á Guð av øllum sínum hjarta. Um Ábraham skuldi leiða ísraelsfólk, vildi Guð vera vísur í, at hann var lýðin í øllum førum, eisini tá ið tað var sera torført, og tað mátti Gud sanna, tá ið hann eisini var lýðin at ofra sín egna son, sum hann elskaði av øllum sínum hjarta.

Gud ynskir, at menniskju skulu vera lýðin. Tað síggja vit nógvastaðni í Bíbliuni. T.d. í 1.Mós. 22,18. Skrivið triðja hvønn bókstav úr tekstinum niðanfyri á reglurnar, so finna tit útav, hvat stendur í hesum ørindinum. Byrjið við fyrsta bókstavinum O og síðani g.

Okmrglptarnsvaóqazxtvåwskshloæøamjnmivyltiklíkbsnøhsunvdmptosklyklgsutrw lwøxupotaukmlxwqlilkaopåripoæikmterwtåplilmjrlkyáplmføknotrnlømvdukmimutn yjfiålmflhbáojnaåyrsiklilkmgukmnpteiårsnminglkm,fklnyoyrrkmritrsakmfturetlhsútrvlor wýcbmdlkgdåpeiertriteøerfdwerdyuemkmtíotrnkmei.

_ _  _ _  _ _ _ _ _ _  _ _ _ _ _  _ _ _ _ _  _ _ _ _ _  _ _ _ _ _  _

_ _ _ _ _ _ _  _ _ _  _ _ _ _ _ _ _ _,  _ _ _ _  _ _  _ _  _ _ _ _ _

_ _ _ _  _ _ _ _.

Postavgreitt blað

# Stendur tú á føstum grundvølli?

Tú ert kanska ein teirra, sum søkir frelsuna við trúgv, og tað gert tú rætt; men tú søkir hesa trúnna hjá tær sjálvum. Tú gert av at trúgva, og stríðist og strevast við títt egna hjarta fyri at fáa hetta upp í lag; men vanlukkan er, at tú vendir eygunum inneftir móti tær sjálvum og leitar í tínum egnu upplivingum og kenslum, um nøkur trúgv man vera at finna.

Tá ið tú so ongan tryggleika finnur, stendur tú og vigar higar og hagar. Og orsøkin er við fáum orðum tann, at tú leitar á skeivum stað. Tú leitar hjá tær sjálvum eftir nøkrum, sum ongantíð hevur verið har at finna; tú finnur tað bert í Guds ráðagerð í himlinum og í hansara heilaga orði.

Tí tað eigur tú at minnast til, at trúgvin kyknar ongantíð upp av tí, at tú gert av við teg sjálvan, at nú skalt tú trúgva; men hon kyknar einans upp á tann hátt, at vit venda eygum okkara burtur frá okkum sjálvum og øllum okkara egna, og líta einans at tí, sum Gud hevur gjørt og opinberað okkum til frelsu. Tí at »trúgvin kemur av tí, sum boðað verður.« Róm. 10,17.

Tú hevur strítt og strevast fyri at trúgva, og bønað og biðið Gud um náði til tess; men kortini hevur tú ongantíð fingið lut í hesi trúgv. Av hesum gerst tú bilsin og fert at leita eftir orsøkini. Men tú eigur ikki at gerast bilsin. Tí tú hevur helst ongantíð fingið fatur í, hvat ið varð avgjørt í Guds frelsuráði í himlinum áðrenn heimsins grundvøllur var lagdur. Tú hevur ongantíð vitað um, ella givið tær far um tann sáttmála, sum Gud ta ferðina gjørdi við Son sín, og um tað testamentið, sum hann tá skrivaði menniskjum.

Hetta eru viðurskifti, sum tað er so avgjørt neyðugt at vita um — og byggja á! Tá fyrstani standa vit á føstum grundvølli, tað er á teirri grund, sum heldur í lívi og deyða. Henda grundin liggur djúpari enn heimsins grundvøllur, tí hon varð løgd longu frammanundan. — »Líkasum hann útvaldi okkum í honum, áðrenn heimsins grundvøllur var lagdur.« Efes. 1,4. Og henda grundin skal verða standandi longri enn grundvøllur jarðarinnar; tí at »um so fjøllini vikast og heyggjarnir ridla, skal tó kærleiki mín ikki frá tær víkja og friðarsáttmáli mín ikki gretta, sigur Harrin, miskunnari tín.« Jesaja 54,10.

C. O. *Rosenius*


**Umbróting:** Brandur Petersen

**Prent:** Estra

**Ábyrgd:** Kristian Thorleifsson

**Útgevari:**
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 225511
T-postur: kmf@kmf.fo
Heimasíða: www.kmf.fo
Konta: 9181-495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað kemur út 8 ferðir um árið (1/2, 15/3, 1/5, 15/6, 1/8, 15/9, 1/11, og 15/12)

Haldaragjald: kr. 150,-